# Størsti hemarin í Shark Atlantic

**Í gjár fingu Magni Blástein og tríggir danskir stuttleikafiskimenn, sum komu til Føroya at fiska mánadagin, størsta hemaran, sum yvirhøvur er fingin í kappingini, Shark Atlantic, sum nú er í gongd á triðja sinni**

SHARK ATLANTIC
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað kann sanniliga loysa seg hjá útlendingum at koma til Føroya at fiska við tráðu. Hetta er nakað, vit leingi hava tosað um, men lutfalsliga lítið hava gjørt við.

Og tó.

Gongd er komin á, og stór fiskikapping við útlendskari luttøku var í Føroyum í fjør summar. Haraftrat hevur kappingin, Shark Atlantic, nú trý ár á baki.

Royndin hjá trimum dønum, sum komu við Norrönu til Føroya mánadagin, prógvar, at tráðufiskiskapur í føroyskum sjógvi so avgjørt er nakað, sum føroyska ferðavinnan og bátaeigarar kunnu gera munandi meira við.

Umstøðurnar at fiska eru góðar, vit eiga nógvar bátar, sum ein stóran part av árinum liggja bundnir við bryggju, og restin er í fyrsta lagi ein spurningur um marknaðarføring úti í heimi.

### Stórur hemari

Magni Blástein í Vestmanna, sum fyri trimum árum síðan tók stig til kappingina, Shark Atlantic, fekk mánadagin vitjan av trimum stuttleikafiskimonnum úr Danmark.

– Menninir settu seg í samband við meg eftir eina samrøðu, sum DK4 hevði við meg í desember.

Hann sigur, at hetta eru stuttleikafiskimenn, sum eitt nú fiska tosk við tráðu í Oyrasundi.

– Vit hava verið tveir túrar, meðan teir hava verið her, ein týsdagin og ein í gjár. Í dag fara teir avstað aftur við Norrönu.

Magni sigur, at týsdagin fingu teir ongan hemara, men í gjár bar rættiliga til, tá ið ein stórur hemari tók.

– Tann eini av monnonum, Henrik Hansen, fekk ein hemara, sum vigaði 222 kilo, ókruvdur.

Hann sigur, at teir vóru staddir suður úr Kirkjubønesi, tá ið fast var.

– Tað tók Henriki hálvan annan tíma at fáa lívið av hemaranum, ið eisini er hin størsti, sum fingin er í kappingini, Shark Atlantic, yvurhøvur.



*Hemarin, sum danin, Henrik Hansen, fekk umborð á bátinum Blástein í gjár, var næstan líka stórur sum hesin, ið leirvíkingurin, Alfred Eliasen, fekk undir Kalsoynni herfyri*

### Endaðu í Hesti

Magni Blástein sigur, at meðan teir fonglaðust við stóra hemaran, róku teir einar seks fjórðingar norðuryvir og vóru staddir miðskeiðis millum Trøllhøvda og Hestoynna, tá ið stríðið var av.

– Vit tóku hemaran upp á sleip og fóru inn í Hestbygd, har ein krani lyfti hann upp í bátin. Síðan løgdu vit inn á Gomlurætt og fingu stóra fiskin við handamegi í land.

Hann sigur, at báðar dagarnar, meðan hann var úti við donsku stuttleikafiskimonnunum, fingu teir eisini nakrar toskar, onkra longu og onkran kongafisk.

– Jú, eg haldi, at hetta var eitt ógvuliga stórt upplivilsi hjá hesum monnum, sum leitaðu higar til lands at fiska við tráðu, sigur fyriskiparin av Shark Atlantic.

### Triðja árið

Tað var Magni Blástein, sum fyri trimum árum síðan framdi sítt hugskot í verki at skipa fyri hesi kapping - at veiða hemara við tráðu.

Í fjør var luttakaratalið 25, og higartil í ár eru umleið 30 við í kappingini.

Kappingin gongur frá 1. november til 1. mars, so enn er høvi hjá fólki, sum hava áhuga fyri tráðufiskiskapi, at tekna seg og verða við í kappingini.

– Hemarin, sum Henrik Hansen fekk mikudagin, er hin fjórði, sum fingin er í kappingini í vetur. Tann størsti, sum frammanundan er fingin í Shark Atlantic, er veiddur av einum øðrum dana fyri trimum árum síðan. Hesin vigaði 194 kilo, ókruvdur.

Magni Blástein sigur, at sjálvur hevur hann mist tveir hemarar á tráðu í vetur - men hann hevur ongan fingið til lands.

– Men tað er so sanniliga eisini spennandi at fylgja gongdini, tá ið aðrir umborð á mínum báti hava fatur í einum hemara, leggur hann aftrat.



*Alfred Eliasen við stóra hemaranum, hann fekk á línu undir Kalsoyarlandinum*

## Eins stórur og heimsmetið...

Magni Blástein, sum stendur aftanfyri kappingina at veiða hemara, Shark Atlantic, sigur, at hemarin, sum leirvíkingurin, Alfred Eliasen, herfyri fekk undir Kalsoyarlandinum, er líka stórur, sum hemarin, ið eigur heimsmetið í støddini.

– Tað er spell, at Alfred ikki fekk hendan hemaran á tráðu í staðin fyri á línu. So, hevði júst hesin fiskurin staðið undir liðini á heimsmetinum, ið er 229 kilo.

Hemarin, sum vit síggja á myndini, og sum leirvíkingurin fekk umborð á báti sínum, Beinta, vigaði júst 229 kilo, ókruvdur.

Størsti hemarin, sum seinastu tríggjar vetrarnar er veiddur í Shark Atlantic, vigaði 194 kilo.

Men í gjár fekk so danin, Henrik Hansen (sí grein omanfyri) ein hemara, sum vigaði 222 kilo.

– Tað eru bara teir fiskarnir, ið verða veiddir við tráðu, sum telja við, sigur Magni Blástein.

**(-vilmund)**

# Aftur at samráðast við Ísland

**Føroyskt vinnulív væntar, at lodnukvotan undir Íslandi verður nakað minni í ár enn í fjør, og somuleiðis er væntandi, at onkrar smávegis broytingar verða í svartkjaftaveiðini**

FISKIVEIÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Samráðingarnar um fiskiveiðisáttmála millum Føroyar og Ísland eru ikki komnar undir land enn, og væntandi verður nýggjur samráðingarfundur ein av komandi døgunum.

Á heimasíðuni hjá Føroya Reiðarafelag vita tey at siga, at eftir almennu vitjanina hjá løgmanni, Jóannesi Eidesgaard í Íslandi, er líkt til, at fiskimálaráðharrarnir í báðum londunum fara at taka samráðingarnar uppaftur.

Felagið væntar, at spurningurin um lodnuna tá eisini verður avgreiddur.

– Lodnukvotan undir Íslandi verður væntandi nakað minni enn tey 30.000 tonsini, sum vit fingu loyvi at fiska í 2006, heldur felagið.

Føroya Reiðarafelag sigur seg eisini hava skilt, at botnfiskakvotan í nýggju fiskiveiðiavtaluni verður hin sama, men at onkrar smávegis broytingar helst verða í svartkjaftaveiðini.

Føroyingar eru ikki nøgdir við, at »klasulur« er á lodnuni, sum vit sleppa at fiska í íslendskum sjógvi.

Íslendingar hava nevniliga tryggjað sær, at lodnan, sum føroysk skip fiska, ikki skal kunna landast til matna í Føroyum, ei heldur virkast til matna umborð á føroyskum skipum.

Hetta líkar ikki føroysku fiskivinnuni, sum heldur, at hesar forðingarnar skulu beinast av vegnum, nú fríhandilsavtala annars er galdandi millum londini.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, segði við Sosialin herfyri, at ein gongd leið er, at føroyingar í fyrstu syfti sleppa at landa - ella virka - ein part av lodnuveiðini til matna.

– Men málið má verða, at hesar forðingar verða beindar av vegnum skjótast gjørligt, legði landsstýrismaðurin dent á.